# Vestmenningur er vaknaður

## Kappingin er so fjølbroytt sum sjáldan

**SUNDALAGSSTEVNA** Fýra nýggir vinnarar vóru kjósaðir í Hvalvík, har tað gekk ógvuliga striltið at fáa gongd á kapPróðurin

Tróndur Arge

Kapróðrarárið tykist fara at vera so fjølbroytt, sum tað sjáldan áður hevur verið tað. Á Sundalagsstevnu í Hvalvík síðsta leygardag vóru nýggir vinnarar í fýra kappingum, og aftur hesa ferð var tað sera tætt í fleiri róðrum.

Vinnararnir vóru úr fleiri økjum kring landið. Vestmenningur vann kappingina millum 10-mannaførini, og Kvívíkingur, sum venur í Vestmanna, og sum gerandiskvøld ofta kapprør við Vestmenning, vann fyri aðru ferð í ár kappingina millum 8-mannaførini.

Páll Fangi úr Klaksvík endurvann kappingina millum 6-mannaførini við monnum, og Sølmundur úr Kappróðrarfelagnum NSÍ á Glyvrum endurvann kappingina millum 6-mannaførini við kvinnum.

Drekin hjá Havnar Róðrarfelag var nýggjur vinnari í kappingini millum 5-mannaførini við kvinnum, Royndin Fríða úr Vági var nýggjur vinnari í kappingini millum 5-mannaførini við dreingjum, og Falkur úr Hósvík var nýggjur vinnari í kappingini millum 5-mannaførini við gentum.

Í barnaróðrunum vóru somu vinnarar sum á Norðoyastevnu. Dreingirnir á Títlingi hjá Havnar Róðrarfelag og genturnar á Teistanum hjá Argja Róðrarfelag.

Umstøðurnar at rógva kapp vóru ikki so galnar. Tað tók langa tíð at leggja bátarnar. Hóast tað varð farið undir barnaróðurin á 250 metrum klokkan 13, so var ikki klárt at senda dreingjabátarnar av 1000 metra málinum fyrrenn klokkan 16, og tað var akkurát so, at 10-mannaførini fóru um málið, áðrenn dómarin klokkan 19 brikslaði fyri fyrstu ferð í landskappingardystinum og stevnudystinum millum EB/Streym og ÍF.

Leygardagin verður aftur kapPróður á skránni. Tá verður kappast á Eystanstevnu á Skálafjørðinum, har tað – eins og í Hvalvík – fer at verða kappast á øllum fýra teinunum – 250 metrar, 1000 metrar, 1500 metrar og 2000 metrar.

trondur@sosialurin.fo



**10-MANNAFØR** Fyri fyrstu ferð síðani á Ólavsøku í 2002 eydnaðist tað leygardagin Vestmenningi at vinna, og nú er tað lagt upp til sera tætta kapping millum Vestmenning og Eysturoying, sum higartil hava vunnið seks FM heiti í part

Tróndur Arge

Tað var eitt sindur óvæntað, at Vestmenningur vann á Sundalagsstevnu. Í kjalarvørrinum av Norðoyastevnuni sigur tað seg sjálvt, at Eysturoyingur var favorittur, men tað var altso Vestmenningur, sum kom fyrstur á mál í Hvalvík.

Á Norðoyastevnu var Eysturoyingur fremstur við 7.14.05, og Vestmenningur var næstfremstur við 7.16.16. Leygardagin var vinnaratíðin hjá Vestmenningi 9.47.13, og Eysturoyingur var næstfyrstur við 9.49.03. Á Norðoyastevnu kappaðust 10-mannaførini á 1500 metrum, og á Sundalagsstevnu kappaðust tey á 2000 metrum. Sammett við avrikið á Norðoyastevnu var avrikið hjá Vestmenningi hesa ferð 4.21 sekund betri enn tað hjá Eysturoyingi.

Søgan sigur, at Vestmenningur ofta hevur verið eitt sindur tungur í startinum, og at tað ikki hevur verið fyrrenn í miðróðrinum og í endaspurtinum, at Vestmenningur hevur tikið tað, sum hevur verið neyðugt at vinna, fyri at koma fremstur á mál.

Soleiðis var tað ikki á Sundalagsstevnuni. Hjá øllum trimum bátunum – Hoyvíkingi, Eysturoyingi og Vestmenningi – var starturin góður. Eina løtu tóktist tað sum um, at Eysturoyingur hevði hug at stinga seg framum, men Vestmenningur helt honum í sera stuttum tjóðri, og so við og við var tað Vestmenningur, sum tað munaði best hjá.

Hoyvíkingur dragnaði, og tá ið Vestmenningur hevði fingið Eysturoying eina bátslongd afturum, bar tað ongantíð til hjá favorittunum at taka vestmenningarnar. Onkra ferðina tódnaði munurin eitt sindur, men á málinum var eingin ivi. Vestmenningur var meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri Eysturoying, sum var fleiri bátslongdir frammanfyri Hoyvíking.

### Teir stóru

Vestmanna er gomul kappróðrarbygd. Seinastu árini hevur tað verið eitt sindur upp og niður hjá 10-mannafarinum. Nú er eldur av álvara komin í aftur, og vestmenningar eru aftur farnir at fylgja við úr vindeygum og túnum, tá ið Vestmenningur summarkvøldini venur.

Í FM søguni, sum gongur aftur til 1973, verður Vestmenningur roknaður millum teir stóru. Um gjørt verður upp í talinum av FM heitum, so er Vestmenningur saman við tveimum øðrum á 2. plássi.

Havnarbáturin eigur flest FM heiti (13), og saman við Eysturoyingi hava Nólsoyingur og Vestmenningur vunnið FM seks ferðir. Tað eru tíggju ár síðani Vestmenningur var meistari, og inntil á Sundalagsstevnu í Hvalvík leygardagin var Vestmenningur ikki komin fyrstur á mál síðani á Ólavsøku í 2002.

Havnarbátin og Nólsoying er tíverri einki at síggja til í ár, og Klaksvíkingur, sum seinastu árini hevur verið so pretin og hevur vunnið tvey FM heiti, er heldur ikki flotaður. Nú eru tað Eysturoyingur og Vestmenningur, sum eru mitt í stríðnum fyri at vinna FM í ár, og harvið í samantalda FM úrslitinum einsamallur at leggja seg á næstfremsta plássið.

Kappingarnar í Klaksvík og Hvalvík boða frá stórum spenningi, og leygardagin verður tað aftur spenningi, tá ið Eysturoyingur fer at rógva í heimasjógvi!

trondur@sosialurin.fo

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 09:47.13 |
| 2 | Eysturoyingur | 09:49.03 |
| 3 | Hoyvíkingur | 10:00.12 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 13 |
| 2 | Vestmenningur | 13 |
| 3 | Hoyvíkingur | 10 |